FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

24. oktober 2025
Mál: 25/27452-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-027/2025

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-027/2025 frá Jóhan Dahl, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Jóhan Christiansen, um status fyri tunnilsverkætlanir, har møgulig endalig fíggjarlig avrokning ikki er framd

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. **Tunlarnir norður um fjall**
   Er nakað fíggjarligt útistandandi millum byggiharra og byggifelagið, sum framdi verkætlanina? Um so er, hvussu stór er upphæddin?
   Er svarið játtandi, er upphæddin tá tøk innan fíggjarligu karmarnar?

2. **Fámjinstunnilin**
   Er hann endaliga avhendaður og avroknaður við byggifelagið, ella er enn arbeiði eftir at fremja?

Svar til spurning 1

Nýggja farleiðin Norður um Fjall var gjørd liðug, avhendað og latin upp fyri almennari ferðslu 19. desembur 2024.

Eftir verklagslógini um tunlar Norður um Fjall við tilhoyrandi vegum kunnu útreiðslurnar av verkætlanini í mesta lagi verða 522 mió. kr., meðan játtaða upphæddin er 492 mió. kr. Játtanin til nýggju farleiðina varð lækkað við 30 mió. kr. í eykajáttanarlógini í heystumfarinum í 2024, tí metingin tá var, at kostnaðurin av verkætlanini fór at gerast lægri enn mett í verklagslógini.

Landsverk hevur bókað 521,4 mió. kr. í útreiðslum til tunlarnar Norður um Fjall. Av hesum eru 21,7 mió. kr. avsettar vegna tvídrátt við Articon. Kravið frá høvuðsarbeiðstakaranum er umleið 42 mió. kr.

Samráðingar eru við høvuðarbeiðstakaran um endaliga uppgerð av verkætlanini. Ymisk tvístøðumál eru løgd fyri tilvísingarbólkin (referansubólkin) til viðgerðar, men eingin semja er gjørd enn. Tí ber ikki til at siga enn, hvat kostnaðurin verður av nýggju farleiðini Norður um Fjall.

Viðmerkjast kann, at tilvísingarbólkurin hevur 3 limir. Ein er valdur av Landsverki, ein valdur av Articon, sum síðani velja formannin í felag. Málið kann eisini enda í Gerðarrættinum.

Svar til spurning 2

Viðvíkjandi Fámjinstunlinum, so er tunnilin endaliga avhendaður og avroknaður við høvuðsarbeiðstakaran. Somuleiðis er el- og trygdarútgerðarbeiðstøkan endaligt uppgjørd.

Landsverk metti, at tørvur var á at gera eyka vatntrygging í tunlinum, og tunnilstoymið hevur arbeitt við at vatntryggja tunnilin í heyst. Landsverk fylgir støðuni, og næsta vár verður støða tikin til, um tunnilin skal vatntryggjast enn betri.

Vegagerðin í Dalinum Fámjinsmegin er ikki heilt liðug. Samráðst verður við hagan um at dagføra avtalu um vegagerð. Samráðingar eru við tveir aðrar hagar í sambandi við tyrving av resttunnilsgróti fram við vegnum oman móti Hundagjógv.

Ætlandi koma hesar avtalur í lag í næstum. Síðan verður farið undir at gera vegin lidnan, umframt at tyrva grót.

Jóhan Christiansen
landsstýrismaður